# Vøkstur í Vágum

Íverksetarahúsið og Felagið Vágar fara nú í gongd við at fremja ítøkiliga íverksetan í Vágunum. Fyrsta átakið verður eitt vinnuligt íverksetarakvøld 2. Juli, har skráin verður 2 x 2 intensar tímar við einum steðgi ímillum. Í fyrra partinum er fokus á at menna nýggj vinnulig hugskot, bæði til nýggj og verandi virki. Yvirskriftirnar eru millum annað hesar: Frá hugskoti til handling – hvussu arbeiðir íverksetin? Nýskapandi handiskonsept – hvussu skapa eitt sterkari varugrundarlag? Vegurin til fleiri og nýggjar kundar – hvussu raka vit teir røttu kundabólkarnar? Í seinna partinum er fokus á vøkstur í verandi fyritøkum við hjálp av vakstrarætlanum. Tiltakið verður hildið á Hotel Vágum, og tilmelding kann fara fram á vagar@vagar.fo ella tlf. 213455.







Manningin á Prosper, sum var umborð um jólini, fekk góðan jóladøgurða við dunnu, og eisini fingu teir jólapakkar frá Sjómanskvinnuringunum og frá reiðarínum.

- Vit ynska at takka fyri gávur og gott samstarv, sigur manningin á supply/standby-skipinum M/S Prosper.

Skipari er Monrad Dalbúð (mynd), og stýrimaður er Laurits Weihe

# P/F Fresh Link við fiski til Skotlands



*Silver Fjord fer at sigla til Scrabster tvær ferðir um vikuna*

**Nú Faroe Ship gevst at sigla millum Føroyar og Scrabster, hava føroysk feløg stovnað nýtt farmafelag, sum kemur at sigla til Skotlands við kølifarmaskipinum Silver Fjord**

FLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í juli mánaða byrjar felagið P/F Fresh Link at sigla millum Føroyar og Skotlands.

- Endamálið er í fyrsta lagi at varðveita møguleikan hjá føroyskum feskfiska-og laksaútflytarum at fáa fiskin í rættstundis á evropeiska marknaðin. Avgerandi málið hjá okkum er, at leveringstíðirnar til okkara viðskiftafólk uttanlands skulu haldast.

Tað sigur felagið, sum er stovnað til at standa aftan fyri henda flutning, P/F Fresh Link.

Felagið hevur útvegað sær kølifarmaskipið Silver Fjord til flutningin.

P/F Fresh Link er stovnað í dag við 4 miljónum krónum í partapeningi, og stovnandi fyritøkurnar eru P/F Valhalla á Toftum og P/F Rainbow Seafood í Havn.

- Silver Fjord fer at sigla til Skotlands tvær ferðir um vikuna, mánakvøld og fríggjakvøld, og siglt verður av Toftum.

P/F Fresh Link, sum hevur leigað skipið, sigur, at hetta er eitt køli-og frystiskip burtur av.

- Silver Fjord hevur síðuportur, men skipið hevur ikki møguleika at taka bingjur. Skipið er bygt á Skála Skipasmiðju í 1984 og er umbygt í Noreg í 1999. Silver Fjord er stórt skip og siglir við góðari ferð. Leigusáttmálin er galdandi í trý ár.

Stigtakararnir aftanfyri ætlanina meta, at felagið hevur fingið eitt sera gott skip at reka kølifarmin við.

- Hetta eigur at geva øllum viðskiftafólkum eina góða tænastu til flutning suður á meginlandið.

P/F Fresh Link sigur, at orsøkin til nýggju farmaleiðina er, at avskiping til Skotlands, ið higartil hevur verið, nú er burtur.

- Støðugt vantandi avskipingarmøguleikar høvdu uttan iva havt sera álvarsligar avleiðingar fyri virksemið hjá flest øllum feskfiska- og laksaútflytarum í Føroyum. Harumframt hevði tað ført við sær, at tað hevði verið trupult hjá fiskaframleiðarum at framleitt mánadagar og týsdagar, sigur felagið.

Ingun Olsen, Saltangará, er stjóri í Fresh Link. Hon hevur í nógv ár arbeitt í shippingvinnuni, og hon hevur nógvar og góðar royndir á hesum øki.

Nevndarformaður er Andreas F. Hansen. Hini í nevndini eru Páll Gregersen, Peter V. Nørgaard, Regin Mikkelsen og Lena Leivsdóttir.



*Nevndarformaður í P/F Fresh Link er Andreas F. Hansen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*